Olaf Olsen, reiðari:

Vit eiga at varðveita trolfríu økini

Hvør er orsøkin til, at fiskiskapurin undir Føroyum er so góður og støðugur?

VILMUND JACOBSEN

Góði fiskiskapurin undir Føroyum kemur allari ísfiskavinnuni, virkjunum á landi og samfelagnum sum heild til góðar.

Tað vísir seg nevniliga, at fiskiskapurin seinastu árini hevur verið meira støðugur enn annars. Og tó; tað er nú einki óvanligt, at tað gongur væl nøkur ár og minni væl onnur ár. Í skriftini lesa vit um sjey feit ár og sjey rakár. Í vinnuni eru árini viðhvørt fleiri, onnur ár færri – bæði í upp-og niðurgongd.

Tó halda summi, at fiskiskapurin seinastu árini hevur verið líka sum meira støðugur enn fleiri undanfarin ár.

Og hvør kann so orsøkin vera til tað?

Alt gitingar

Lítil ivi man vera um, at sjálvt veiðitrýstið á fiskastovnarnar avgerð bert ein part av allari gongdini. Ikki minni týdning hava vakstrarlíkindini hjá fiskinum, sum kemur undan, tá ið gýtt er. Er nógv í "haganum", spyrst lítið burtur úr, um einki er at eta – og tá kemur heldur einki undan.

Onkur hevur róð uppundir, at trolfríu økini og útihýsingin av ídnaðarskipunum undir Føroyum kunnu hava havt sín týdning fyri tann "stabilitet", sum nú vísir seg at vera.

- Men hetta eru alt gitingar, heldur Olaf Olsen, sum er reiðari á átta trolarum.

Hann vísir á, at økir verða "permanent" friðað, onnur sum verja fyri gýtingarfiskiella ungfiski, og reglur verða settar um størri meskavíddir. Á henda hátt ber til at stabilisera veiðina, um fyritreytirnar í havinum annars eru í lagi.

- Hvat av øllum hesum hevur størst týdning, er torført at siga, tí tað veit ivaleyst eingin við vissu, heldur reiðarin.

Olaf Olsen sigur, at hann hevði ikki mælt til at latið trolfríu økini uppaftur, tí tey kunnu saktans hava havt sín týdning í "stabiliseringini" av veiðini

Friðaðu økini

Olaf Olsen sigur tó, at hann hevði ikki mælt til at latið tey trolfríu økini uppaftur, tí tey kunnu saktans hava havt sín týdning.

- Ymiskt er, hvønn týdning tey ymisku verndartiltøkini kunnu hava, tí fiskasløginieru ymisk. Summi eru meira viðbrekin enn onnur, eitt nú tey á djúpum vatni, sum nørast og veksa seint, sigur Olaf Olsen.

VIÐMERKINGAR

Føroyar fólk hava ikki ráð til sitandi landstýrið

Edmund Joensen

- Hall er á løgtingsfíggjarlógin fyri 2002.
- Besta intøkuárið í Føroya søgu mugu avdrøg av landskassans skuld gjaldast av innistandandi.
- Veruligi útreiðsluvøksturin á løgtingsfíggjalógini hetta valskeiðið ferð, tá ið samanum kemur, at nærkast eina heilari milliard.
- Fíggjarlógin var ikki meira enn samtykt, tá sjálvur løgmaður, tann 7. januar boðaði frá fyrstu eykajáttanini í 2002.
- Samlaðu eykajáttanirnar í 2001 vóru heilar 207 mió. krónur.
- Landstýrið er nú eftir øllum at døma av álvara farið undir endaligu útgjaringina til løgtingsvalið.

Beint áðrenn jól samtykti ein minniluti (15 av 32 løgtingsmonnunum) løgtingsfíggjarlógina fyri næsta ár. Trettan atkvøður vóru ímóti, ein tingmaður atkvøddi ikki og tríggir vóru ikki í salinum.

Hetta er so fyrstu ferð í Føroya søgu, at ein løgtingsfíggjarlóg til seinastu og endaligu viðgerðina hevur fingi so lítla undirtøku (og so stóra mótstøðu) í Løgtinginum.

Hetta er somuleiðis ein stór fallieturklering til sitandi landstýrið og meirlutan á løgtingið.

Í framkomnu londunum, sum vit vanliga sammeta okkum við, hevði stjórnin í stundini endurskoða sín politikk ella farið frá.

Síðani nýggja stýriskipanarlógin kom í gildi, hava politiskir flokkarnir roynt at taka til sín síðvenjuna at atkvøða fyri løgtingsfíggjarlógini til seinastu og endaligu viðgerðina. Vanliga politiska toganin um konti og játtanir til ymisku økini í landinum er tá av, og prioriteringin hjá einum meirluta er tá staðfest. Hetta verður gjørt í ásannan av- og víðring fyri tí demokratisku skipanini vit hava. Landið skal undir øllum umstøðum hava eina løgtingsfíggjarlóg.

Landstýrið og samgongan gjøgnumtrumfaðu uttan fyrilit fyri føroyska samfelagnum so grundleggjandi og skaðiligar broytingar til løgtingsfíggjarlógina, at andstøðan atkvøddi ímóti meðan partur av samgongini helt seg burtur.

Hvørki tingmenn ella fólkið hevur álit á førda politikkinum

Tað sum hent er á Føroya løgtingi í sambandi við løgtingsfíggjarlógina fyri 2002 má sigast at vera ein sannan av, at hvørki meirlutin á løgtingið ella av Føroya fólk hava álit á førda politikkinum.

At flestu fólk ikki hava álit á landstýrinum og sitandi meirluta á tingið, kan ikki koma óvart á nakran. Hetta er so týðiliga komið fram, í dagligari talu ímillum manna, og eisini í teimum nógvu veljarakanningunum sum verið hava.

Fólkatingsvalið fyri kortum talar eisini sítt týðiliga mál. Føroyingar taka snøgt sagt ikki undir við førda loysingarpolitikkinum, har heildarveitingin og vælferðin verða skerd. Tey síggja sjálvandi, at hesin politikkur er landsskaðiligur og má steðgast ongantíð ov skjótt.

Spurningurin sum eftir stendur er, um Føroyar hava eitt landstýri og ein samgonga, sum eru so ússalig og so koyrd føst, at tey sjálvi ikki finna úthurina ? Mangt bendir á at so er. Eitt er vist, Føroya fólk hava ikki ráð til hetta landstýrið.

Færø Bank sagen

Kaj Leo Johannesen
Sambandsflokkurin

Gekk og hugsaði hvat lá fremst í huganum til eina Jólagávu, og kom eg til tað niðurstøðu, at eg ynskti tvær bøkir at lesa, onnur Færøernes land eftir Hans Jacob Debes, og hin Færø Bank sagen eftir Richard Mikkelsen, helt at báðir hesir persónar vóru somikið áhugaverdir at fara í holt við at lesa.

Nú eftir Jól siti eg og lesi Færøernes land, meðan hina havi eg enn ikki fingið, eftir sum hon varð útseld beinavegin, helst man tað koma av at Føroya fólk, einans bleiv fóðrað við okkara egnu meiningum av ábyrgdini í bankamálunum.

Grundin at eg ynskti mær hesa bókina hjá Richard Mikkelsen var at eg saknaði eina greiða gjøgnumgongd, av hinari síðuni av banksakini, og er hann eftir mínum tykki, tann einasti, sum kundi greiða frá allari gongdini, í hesum ógvuliga stóra, og eftir míni metan einkla máli, at so ein bólkur av sakførarum og embætisfólki aftaná, fór ígongd við prívførslir, fyri at reinsa politiskar myndugleikar, var tað sum gjørdi, at málið gjørdist ein fløkja.

Vit fingu nakrar góðar subjektivar sjónvarpssendingar sæð við Føroyskum eygum, sum eftir mínum tykki settu fleiri spurningar, nú nøkur ár eru farin, hava vit fingið staðfest ábyrgd til Danmarkar, meðan eingin ábyrgd er staðfest, her heima.

Eg skrivi ikki hesar reglur fyri at leggja eftir nøkrum, men eg kann ikki annað enn undrast yvir, hvussu vit hava megna at sloppið okkara egnu undan ábyrgd.

Haldi meg minnast trongdina hjá ávísum politikarum at reinsa seg sjálvar, við at blaku runu eftir Richard Mikkelsen, so tú fekst tað fatan, at hann var tann sum hevði ábyrgdina av at bankin fór av knóranum.

Um Richard Mikkelsen gjørdi nakað skeivt, tað veit eg av góðum grundum ikki, eftirsum eg sum sagt, enn ikki havi fingi fatur á bókini hjá honum, fyri at gerða mína egna niðurstøðu av hansara dispositiónum, í samband við Bankamálið.

Annars vil eg ynskja øllum mínum landsmonnum eitt gott nýggjár, og ynskja alt tað besta fyri okkara stolta fólki framyvir.

Búskapur og vinna:

Nýggjur sáttmáli

Noreg og Suðurkorea hava skrivað undir nýggjan sáttmála um samstarv á ymsum økjum. Sáttmálin umfatar m. a. samstarv innan fiskaaling, handils við fiskaúrdráttum og gransking.

Skrivarin í norska fiskimálaráðnum, Solveig Strand, sigur, at sáttmálin kann fáa stóran týdning fyri báðar partar. Hon leggur afturat, at møguleiki er at víðka sáttmálan seinni, sum hann eisini kann umfata annað samstarv.

Avtalað er, at norsk og suðurkoreansk umboð skulu hittast annaðhvørt ár at viðgera mál av felags áhuga.

Bretar fyri evruni

Fyri fyrstu ferð vísir ein kanning, at nýggja evropeiska gjaldoyrað, evran, hevur størri undirtøku enn mótstøðu í Bretlandi.

Sambært teirri nýggju kanningini vilja 40 prosent hava evruna setta í gildi, meðan 39 prosent siga nei. Hini 21 prosentini hava ikki tikið støðu til spurningin um at seta evruna í gildi ístaðin fyri pundið.

Tony Blair, forsætisráðharri er heitur talsmaður fyri evruni, men hann hevur ikki viljað lagt spurningin út til gólkaatkvøðu, tí allar kanningar hava higartil víst, at flestu bretar eru ímóti. Eygleiðarar í London siga, at fólkaatkvøðan er í hvussu er komin nærri nú.

Bílagt hundrað flogfør

Flogfelagið Ryanair hevur bílagt ikki færri enn hundrað flogfør av slagnum Boeing 737-800. Keypsprísurin er 77 milliardir krónur, og hetta er fyrstu ferð, at sama felag bíleggur so nógv flogfør av 737-røðini.

Ryanair, sum er eitt av teimum sonevndu "bíligu" flogfeløgunum, flýgur m. a. millum London og Århus, og í apríl fer felagið eisini at flúgva millum London og Esbjerg.

UTTAN ÚR HEIMI

Taliban-revsingar galda framvegis í Afghanistan

Afghanar lurta, meðan nýggju leiðararnir greiða frá, at gomlu revsireglurnar hjá Taliban-stýrinum halda fram

Mynd: Reuters

Brotsmenn í Afganistan verða framvegis revsaðir eftir islamskari sharia-lóg eins og undir Talibanstýrinum

AFGHANISTAN
Árni Jensen

Teir afghanar, sum væntaðu, at tær hørðu revsingarnar undir falna Talibanstýrinum fóru at fáa sín enda saman við stýrinum, mistóku seg. Hósdagin kunngjørdi hægstirættur í Kabul, at myndugleikarnir fara framvegis at nýta ta islamsku sharia-lógina at áseta revsingar eftir.

Hetta ber m. a. í sær, at brotsmenn kunnu vænta at verða steinaðir, og er brotsverkið av serliga grovum slagi, kann revsingin vera, at onkur likamslutur verður skorin av. Hjúnarskilnaður er sambært sharia-lógini brotsverk, og tey seku verða steinað.

Taliban-stýrið var kent fyri at skipa soleiðis fyri, at almenningurin slapp at hyggja at, tá fólk vórðu revsað. Eisini hesin síður heldur fram undir nýggja stýrinum.

- Guð hevur sagt, at fólk skulu vera hjástødd, so tey kunnu vera vitni, og soleiðis at tey kunnu taka við læru, segði Fazul Hadi Shinwari, hægstarættarformaður.

Alment siga afghansku myndugleikarnir, at tað er neyðugt at halda fram við teimum hørðu revsingunum fyri at fáa tamarhald á tí stóra kriminalitetinum í landinum.

Ófriður

Hóast bardagin um valdið í Afghanistan langt síðani er av, og umheimurin hevur viðurkent tillagingarstjórnina um landsins lógligu stjórn, halda krígsharrar fram við bardaganum um valdið í pørtum av landinum.

Har norðuri í landinum hava bardagar verið seinastu vikuna millum tveir av teimum krígsharrunum, sum vóru uppi í Norðursamgonguni, ið rak Taliban-stýrið frá við amerikanskari og russiskari hjálp.

Eisini har eysturi í Afghanistan hevur tað verið ófriðarligt, og stjórnin í gjørdi í gjár av at senda ein semingsnevnd at royna semju. Her eru tað partar av teirri sonevndu Eystursamgonguni, saum stríðast um valdið har eysturi í landinum.

Ivi um brúgvaíløgu

Evropeiski íløgubankin EIB ivast í einari ætlan at byggja eina brúgv millum italska meginlandið og oynna Sisilia.

ÚTLENDSK SAMFERÐSLA
Árni Jensen

Italska stjórnin hevur samtykt at byggja eina brúgv yvir um Messinasundið millum meginlandið og oynna Sisilia. Talan er um eina vega- og jarnbreytarbrúgv, og kostnaðurin er mettur til einar 40 milliardir krónur.

Sum er sigla ferjur um Messina-sundið. Tey, sum eru fyri fasta sambandinum, halda, at tey, sum skulu koyra um sundið, eiga at rinda bummpengar, og at verkætlanin á tann hátt verður sjálvfíggjandi. Italia hevur annars biðið evropeiska íløgubankan um fígging, men har ivast leiðslan í, at tað fasta sambandið loysir seg landsbúskaparliga.

- Vit tosa um ein part av Italia, har ein stórur partur av tí vanliga fólkinum bara hevur atgongd til reint vatn nakrar fáar tímar um dagin, sigur varastjórin í evropeiska íløgubankanum, Massimo Ponzellini.

Hann heldur, at ætla italsku myndugleikarnir kortini at nýta so nógvar pengar, er íløgan í brúgvasambandið um Messinasundið ikki tað, sum eigur at koma í fyrstu røð. Ponzellini heldur, at nógvar aðrar uppgávur liggja á láni, og hann hevur tí mælt stjórnini í Rom til heldur at endurnýggja toksambandið millum meginlandið og Sisilia. Sum er verða tokvognarnir fluttir við serligum tokferjum.

Úr Norðurlondum:

Dýrt at flúgva

Norsku myndugleikarnir hava gjørt av at kanna, hví tað er so nógv dýrari at flúgva innanlands í Noregi enn í Svøríki.

Kanningin verður sett í verk, eftir at ein flogferðaseðil millum Oslo og Tromsø er farin at kosta 6.288 norskar krónur. Fyri hesar pengarnar ber til at fáa ein vikuskiftisferðaseðil úr Oslo til San Francisco ella Bangkok, men tað, sum argar norðmenn mest, er, at ein ferðaseðil við flogfari úr Stockholm til Kiruna kostar bara 3.630 norskar krónur.

Ein talsmaður hjá norsku myndugleikunum heldur, at kappingarviðurskiftini á rutuni millum Oslo og Tromsø man hava stóra ávirkan. Fólk hava stutt sagt ov lítið at velja í, sigur hann.

Bíligari at ættleiða

Ein meiriluti av teimum donsku fólkatingslimunum halda, at tað er ov dýrt hjá dønum at ættleiða børn, og tí hevur almannamálaráðharrin Hnriette Kjær boðað frá einum nýggjum uppskoti í summar.

Sum er letur tað almenna 37.130 krónur í stuðuli í sambandi við ættleiðing, men sambært summum politikarum noyðast fólk stundum at rinda meira enn 100.000 krónur úr egnum lumma. Hesir politikararnir halda ikki, at tað fíggjarliga eigur at vera tað avgerandi hjá fólki, sum vilja ættleiða.

Aðrir politikarar bera ótta fyri, at játtar tað almenna meiri stuðul, fara feløgini, sum skipa fyri ættleiðing, at skrúva prísin upp. Úrslitið verður so, at tann økti stuðulin endar í kassanum hjá feløgunum og kemur ikki foreldrunum til góðar.